Fram-Mjølnir 2-3 (24-26, 25-23, 25-16, 23-25 og 10-15)

Klaksvíkin framvegis fremst

Klaksvíkingar vunnu oddabrakið í Havn um vikuskiftið, og styrktu harvið um oddastøðuna í bestu mansdeildini

FLOGBÓLTUR, MENN

Oddaliðini meistaradeildin hjá monnum í flogbólti, Fram og Mjølnir, møttust leygardagin á Eysturskúlanum, og hetta gjørdist ein sera spennandi dystur , har avgerðin ikki fall fyrr enn eftir 5. settið.

Hóast Eysturskúlin er ein góð høll, so hevði verið betri, um ein slíkur dystur varð leiktur í eini ítróttarhøll – tí tað hevði hann uppiborðið.

Talan var um ein sera spennandi dyst leygardagin. Mjølnir dróg at enda longra stráðið, og styrkti harvið um oddastøðu sína

Mynd: Álvur Haraldsen

Javnt beinan vegin

Beinan vegin í fyrsta settinum var spenningur, og liðini fylgdust allan vegin heilt til endans, men megnaði Mjølnir at vinna 26-24.

Í øðrum setti vóru heldur ongantíð meira enn 2 stig á muni alt settið, og ungir leikarar sum Hjalti Josephsen, Mjølnir og Suni Petersen, Fram, vóru við til at seta dám á dystin við nøkrum goðum miðálopum. Ímóti endanum á settinum kom Fram framum við tveimum stigum – 21-23 –, men Mjølnir gav ikki upp og vann bóltin aftur, men til alla ólukku servaði John Syderbø í netið, soleiðis at Fram kom uppá 24 stig. Fram vann settið 25-23.

Rúni við góðum hoppservum

Spenningur var nú undan 3 setti, men við fleiri góðum hopservum frá Rúna Weihe, legði Fram seg á odda 9-4, og hesin munurin helt sær alt settið. Mjølnir hevði stórar trupulleikar í hesum settinum at fáa spælið at koyra, eins og Fram hesa løtuna leikti tann vakrasta flogbóltin, liðið higartil hevur megnað í ár. Rumenin Pasco Romica hevði nøkur sera góð smash, eins og Bernhard Petersen ofta fekk lagt upp til stuttar bóltar á miðjuni, uttan at nakar blokkur var frammanfyri. Fram vann settið 25-16 og var sostatt á odda 2-1 og eftir hetta varð roknað við, at Fram fór at klára at hála sigurin heim.

Fram best frá byrjan

Og Fram kom eisini best frá byrjan í 4. setti og legði seg klárt á odda 12-7 og førdi eisini 16-9. Hesa løtuna sá tað út til, at m.a. Borco ikki spældi upp til sítt besta, men so knappliga fór alt at koyra aftur, og Mjølnir byrjaði spakuliga at vinna seg inn á Fram aftur. Samstundis sum Mjølnir fór at leika betur, var eitt sindur av illstøðu ímillum Fram-leikararnar, og var hetta møguliga eisini við til at taka sigurin frá teimum. Eisini tóktist tað sum um Romica – sum hevði leikt ein góðan dyst higartil – gjørdist eitt sindur troyttur til seinast, og ikki megnaði at sláa avgerðandi bóltar ígjøgnum, hóast at hevingin ikki lá til vildar.

Endin var at Mjølnir vann settið 25-23.

5-settið

Og byrjanin av 5. setti gjørdist eisini spennandi. Tá liðini skiftu síðu í 5. setti, var støðan 8-6 til Mjølnir, men so misti Fram alt á gólvið og endin var eisini at Mjølnir vann settið 15-10 og harvið dystin 3-2.

Dysturin var gjøgnumgangandi sera vælleiktur og kundi eins væl enda annarleiðis, um Fram hevði klárað at hildið konsentratiónina allan dystin. Rúni Weihe hjá Fram leikti ein sera góðan dyst og var tað ein fragd at síggja hansara hoppservur, eins og tann eina »back-spikin«, sum hann dundraði í gólvið.

Fram hevur nú tapt seinastu tríggjar dystirnar, og um teir framvegis vilja náa toppin, mugu teir royna at vinna komandi dystirnar.

Trygvi Poulsen Mjølnir

Munurin á liðunum var eingin, og dysturin kundi tí fara báðar vegir. Hjá okkum stóð einki til í 4. setti, tí Fram var á odda 16-9 og vit høvdu einki at bjóða aftur ímóti teirra góða spæli. Time-outið vit tá tóku, vendi dystinum. Borko bað okkum gloyma tað, sum var hent, og bara hugsa um tað, vit nú skuldu gera. Tað eydnaðist. – Spælið hjá okkum broyttist, og serliga blokkurin hjá okkum kom aftur í sving. Hesaferð var hepnið við okkum, og vit eru sjálvandi ógvuliga fegnir um úrslitið.

Romica Pascu Fram

Spælið hjá okkum var tað besta, tað higartil hevur verið í kappingini. Tíverri vóru eisini nakrar løtur, tá ið spælið dovnaði, og tað útnyttaði Mjølnir til fulnar. Í 2. og 3. setti spældu vit so væl, sum eg veit vit kunnu. Serliga 3. settið eri eg væl nøgdur við. Men eg var bangin fyri, at dysturin fór at koppa í 4. setti, tí eg haldi, at tað gekk ov lætt hjá okkum at fáa stigini. Tá ið Mjølnir nærkaðist, komu vit ikki í sving aftur, og tað kostaði. Vónirnar til framtíðina eru tó sera góðar, tí vit vístu í dystinum, at tá ið spælið hjá okkum gongur, eru vit ikki at steðga. Vit koma sterkt aftur!

Dráttur–ÍF 3–0

Lættur sigur

Ta› var einki ivamál um úrsliti›, tá Dráttur um vikuskifti› fekk vitjan av ÍF

FLOGBÓLTUR, KVINNUR

Dráttur vann enn einafer›. Hesafer› var ta› ÍF sum fekk at kenna, at Dráttur ætlar sær okkurt heilt stórt hetta kappingarári›.

Dysturin var fluttur av Giljanesi til Sørvágs, tí høllin er upptikin. Hetta merkti dystin, og serliga ÍF hev›i ein ringan dag. Trupult var hjá teimum at koma til Sørvágs ásettu tí›ina, og ta› tóktist sum um tankarnir lógu eftir í Fuglafir›i.

Dráttur hev›i als ongar trupulleikar at innstilla kanónirnar í n‡ggju høllini, og spæli› hjá teimum gekk sera væl. Ágangandi servur, serliga frá Helgu Nordendal, løgdu grundarlagi› fyri sigrinum, sum ongantí› var í vanda.

Dráttur er væl fyri hetta kappingarári›, og nú er Gerda Nattestad, ein av ungu evnaríku leikarunum komin aftur á li›i›. Gerda var vi› á A-landsli›num, sum vann gull á Oyggjaleikunum á Gotlandi, so hon er ikki hvør sum helst.

ÍF er betri enn ta›, sum var› víst í Sørvági leygardagin. Hetta var bara ein av teimum døgunum, sum skal gloymast sum skjótast.

Rønn Eliassen, ÍF

Vit klára›u okkum ikki serliga væl ímóti Drátti, men framgongd er at hóma alla tí›ina. Vit hava ein gó›an venjara í jugoslavanum Boban, so eg rokni vi›, at tá kappingarári› er li›ugt, fara vit at klára at liggja á einum tri›japlássi og fáa bronsumerkini.

SÍ–ÍF 0–3 (21-25, 20-25, 13-25)

ÍF fylgir Mjølni

Fuglfir›ingar tykjast í løtuni at vera einasta li›i›, sum kann hótta klaksvíkingar. Um vikuskifti› mátti SÍ taka til takkar vi› grei›um tapi á heimavølli

FLOGBÓLTUR, MENN

Landskappingin hjá monnunum ver›ur helst ein av teimum mest spennandi í nógv ár. 4 li› liggja væl fyri í kappingini: Mjølnir, ÍF, Fram og Fleyr. Bara SÍ letur til ikki at kunna fylgja vi›.

Hjá ÍF liggur serliga væl fyri. Li›i› tapti fyrsta dystin í landskappingini, men sí›an tá er vent í holuni. Jugoslavin Boban hevur fullkomiliga broytt hugbur›in hjá spælarunum, og li›i› spælir gó›an flogbólt. Hjá ÍF hevur styrkin altí› veri›, at menn strí›ast sera nógv, og fáa nógvar bóltar upp aftur úr gólvinum. Í ár er álopsspæli› eisini sera gott, tí Boban er óførur at smasha, og Bartal Eliasen spælir sum ongantí› fyrr. Li›i› er nú væl samanspælt, og spæli› er fjølbroytt.

SÍ væl vi›

Dystin ímóti SÍ skuldi ÍF tí ongar trupulleikar havt at vunni›, í hvussu er um hugt ver›ur eftir stigatalvuni. Men SÍ er nógv betri á heimavølli enn á útivølli, og uppgávan hjá ÍF gjørdist als ikki so løtt.

Í fyrsta settinum var munurin lítil á li›unum. SÍ megna›i at fylgja ÍF og var enntá eisini frammanfyri, men tá i› hálvt setti› var› fari›, tók ÍF seg naka› framum, og ta› var nóg miki›. Nakrar óney›ugar villur á SÍ-li›num kosta›u d‡rt.

Gongdin var tann sama í 2. setti. Javnt upp í 15, men so fór ÍF frá og tók setti›. Hjá ÍF vóru fleiri streingir at spæla á, og eisini hava leikararnir royndir, sum SÍ-leikararnir ikki hava. SÍ hevur megna› í fleiri dystum at spælt javnt upp ímóti hinum li›unum, men ta› seinasta hevur mangla›.

Fór ta› at eydnast í 3. setti?

Tó at ÍF nú var frammanfyri 2-0, so var dysturin ikki avgjørdur, men avger›in fall skjótt. ÍF kom framum 10-0 í 3. setti, og so var einki hjá SÍ at gera. Dysturin var taptur, og enn er framvegis einki stig fari› til Sørvágs hetta kappingarári›.

Fleyr–Fossánes 3–0; (25-13, 25-13 og 25-17)

Fossánes misti sí›sta setti›

Fleyr vann heimadystin móti botnli›num av Fossanesi, og enn eigur Fossanes fyrsta setti› til gó›ar

FLOGBÓLTUR, KVINNUR

Unga Fossánes-li›i› var sunnudagin í Havn og leikti ímóti Fleyr, sum hevur klára› seg í kappingini vi› ÍF og TB, men ikki vi› oddali›ini Drátt og Mjølnir.

Ta› var ongantí› ivi um, at Fleyr var ta› betra li›i›, men um genturnar á Fossánesi klára at vera eitt sindur meira róligar undir leiki, so kann roknast vi›, at fyrsta setti› ver›ur vunni› í seinnu helvt av kappingini eftir n‡ggjár.

Tær klára sum oftast at fáa fatur á bóltinum, men trupulleikin er at fáa henda á rætt sta›, men vi› fleiri dystum, og um hildi› ver›ur á vi› venjingini, hevur li›i› eina framtí› fyri sær. Ta› er stórur munur at vinna 1. deild, og so at leika í bestu deildini.

Meira ágangandi

Fleyr-li›i› hevur onkrar n‡ggjar leikarar á li›num í ár, men hevur tó megna› at vunni› á bæ›i ÍF og TB, men torførari er at koma upp á sama stø›i sum Dráttur og Mjølnir. Í dystinum ímóti Fossánesi sást tí›uliga, at li›i› manglar meira stabilitet frammi vi› neti›, solei›is at meira kraft ver›ur løgd í álopini, og bóltarnir ver›a vunnir beinlei›is ísta›in fyri bert at koyra bóltin yvirum.

Durita Jóanesardóttir í servihumør

Fleyr vann lættliga 1. og 2. setti›, og leg›i seg eisini á odda í 3. setti, eitt skifti vi› 15-11, men so tók Fossánes sær um reiggj og kom heilt upp á stø›una 16-16, og ein rokna›i vi›, at kanska li›i› nú fekk sítt fyrsta sett, men hetta vildi Durita Jóanesardóttir annarlei›is. Vi› nøkrum sera hør›um servum ímóti endanum av settinum, avgjørdi hon dystin, solei›is at Fossánes ikki fekk eitt bein til jør›ina aftur og tapti setti› 25-17, hóast venjarin hjá Fossánesi, Jón Kári Fredriksen, royndi seg vi› 3 útskiftingum.

Samanumtiki› ein uppiborin sigur til havnarli›i›.

TB–1-3 (22-25, 25-20, 17-25 og 12-25)

Mjølnir vann uttan fulla manning

Uttan Marjun Kalsø á li›num megna›i Mjølnir at vinna á TB, men onkuntí› stó› tó nógv á undir dystinum

FLOGBÓLTUR, KVINNUR

Hóast ein av berandi kreftinum á Mjølnirli›num, Marjun Kalsø, ikki var vi› á Tvøroyri, so megna›i TB ikki at vinna dystin ímóti klaksvíkingunum.

Tvey tey fyrstu settini vóru nøkulunda jøvn, harav bæ›i li›ini vunnu hvør sítt, men sí›ani fór spenningurin úr dystinum.

Tina óhugnalig

Av Tvøroyri frættist, at ta› serliga var mi›leikarin Tina Jacobsen hjá Mjølni, sum leikti ein avbera gó›an dysti. Hon vann alt hon nært vi› frammi vi› neti›, eins og ta› var sera nógv kraft á sløgunum, solei›is at at Winnie Djurhuus og co. hjá TB, ikki høvdu nakran møguleika at fáa hendur á bóltinum. Eisini Anna Jacobsen og Margit Joensen leiktu væl hjá Mjølni.

Seinasta setti› enda›i heili 25-12, og hetta setti› nærmast stó›u TB-leikararnir bara á vøllinum. TB-liggur nú næstaftast í meistaradeildini, og um tær skulu gera sær vónir um at vera millum tey tr‡ bestu li›ini, má meira kraft fáast í álopi›, eins og móttøkurnar mugu betrast.